



seg sjálvar á framsýningini í monumentalum einsemi. Tó kundu teir mongu reyðu søluprikkarnir undir júst hesum myndum bent á, at tey eru mong, ið eru ósamd hesum viðvíkjandi og sum tvørturímóti eru hugtikin av teimum heitu og lekru litunum og sansaligu myndaevnunum av samanfløktum, naknum kroppum.

Á einari av hesum myndunum síggja vit tríggjar grønligar kvinnuligar verur í løgnum nektardansi framman fyri eyðkenda profilin av Nólsoynni, ið dagar ljósabláur upp móti sóljugula himmalhválvinum. Í staðin fyri bein hava hesar verurnar tentaklar, sum vaksa upp úr undirgrundini. Alt hongur saman á ítøkiligan hátt í hesum surrealistiskt merkta hugaheiminum í myndum, sum við teirri sløttu, monokromu bakgrundini og teimum naknu menniskjaverunum minnir eitt sindur um lýsingar hjá danska málaranum, Michael Kvium, tó uttan hansara dapra svartskygni. Ein onnur grønlig mynd, sum er dømi um dekorativa ans Rannváar, hongur í gongini og hevur heitið "Mín frumborna". Sitandi kvinnuveran í miðjuni kundi mint um ein mediterandi Shiva. Í øllum førum kundi íblásturin stavað úr India, har listakvinnan hevur verið fleiri ferðir og tekna og málað. Fingrarnir á kvinnuni ganga út í træðrir, ið binda hana til trunkan av likamslimum í erva. Violettu blómurnar í neðra eru dekorativar, men innihaldsliga hevur henda myndin ógvuliga lítið uppá seg.

## Tað skulu koma dagar

Sambært tíðindaskrivinum er framsýningin hjá Rannvá Holm Mortensen afturlítandi vísandi tað, sum listakvinnan hevur gjørt, umframt samtíðarlig og nýggj verk. Vit hava sæð monumentala verkið "Tað skulu koma dagar" áður, og tað er enn saman við hinum risaverkinum "*Samskifti*" millum áhugaverdastu verk Rannváar, har hon í føroyskum høpi brýtur upp úr nýggjum. Listasøguliga eru hesi verk eisini serlig bara við tað, at tey mær vitandi eru tey størstu, sum nøkur føroysk listakvinna hevur gjørt og her mugu vit jú staðfesta, at støddin er av týdningi. Verkið, ið er ein monumental kollasja í 12 pørtum, er miðsavnað kring eina fotomynd av málninginum "Hin fjórða stættin" hjá italska listamanninum Guiseppe Pelizza da Volpedo og sett saman av fleiri ymiskum myndum, millum annað einum føroyakorti og svørtum og hvítum fotomyndum og oman á alla hesa myndaherligheitina hevur listakvinnan málað eina æðra- og rørskipan, sum á einfaldan, men sterkan hátt vísir á hvussu alt hongur saman.

Sosiala indignatiónin er einki øðrvísi í myndini hjá Rannvá í mun til ta gomlu myndina hjá Volpedo, sum er frá aldarskiftinum uml.1900 og aftrat teirri formligu nýskapanini er tað hendan reina, sannførda og ivaleysa rættvísiskenslan, sum er hugtakandi í eini hugsjónarleysari tíð.

Framsýningin í Listasavni Føroya letur aftur 14.desember. Bókin Rannvá Holm Mortensen við teksti eftir Malan Marnersdóttir fæst til keyps á Listasavninum og í bókahandlum.





